# MÁLRÁÐIÐ

øll eiga málið

ÁRSFRÁGREIÐING **2021**

## Innihaldsyvirlit

| | |
|---|---|
| Innihaldsyvirlit | 2 |
| Endamál | 3 |
| Inngangur | 4 |
| Limirnir í Málráðnum | 6 |
| Starvsnevndin | 8 |
| Starvsfólk | 8 |
| Ráðgeving | 9 |
| Fundir í Málráðnum | 10 |
| Nýggj orð | 11 |
| Stavsetingarorðabókin | 12 |
| Hendingar í 2021 | 13 |
| Roknskaparárið 2021 | 13 |

**Endamál**

Málráðið hevur sum endamál at røkja, menna og verja føroyska málið, at vegleiða, ráðgeva og gera niðurstøður í málspurningum og at áseta føroyska stavseting. Málráðið skal savna og skráseta nýkomin orð, máliskur, framburðir og onnur málslig fyribrigdi í føroyskum og skal vera til hjálpar at velja og evna til nýggj orð.

Málráðið gevur landsstovnum og almenninginum vegleiðing, ráð og upplýsing um føroyskt í talu og skrift. Almennir myndugleikar eiga í størst møguligan mun at fylgja niðurstøðunum hjá Málráðnum.

Eisini kunnu stovnar og einstaklingar venda sær til Málráðið við spurningum. Málráðið eigur at samstarva við fjølmiðlar, stovnar og almennar myndugleikar, ið hava stóra málsliga ávirkan. Í sambandi við yrkisbólkar skal Málráðið menna gott føroyskt yrkismál og annars skipa fyri átøkum málinum at frama.

Málráðið ritstjórnar og greiðir til útgávu eina føroyska stavsetingarorðabók, sum landsstýrismaðurin løggildir. Almennir myndugleikar hava skyldu at fylgja ásetingunum í stavsetingarorðabókini.

Málráðið er málrøktar- og málmenningarstovnur, skipaður undir landsstýrinum og í virksemi sínum óheftur av politisku skipanini.

**Inngangur**

Sitandi Málráð tók við 1. juli 2021. Ráðið telur 11 limir, og tað er landsstýrismaðurin í Uttanríkis- og mentamálum, ið hevur útnevnt limirnar millum uppskot, ið vóru komin frá stovnum og feløgum, sum á ymsan hátt varða av føroyskum máli. Stór útskifting hevur verið í Málráðnum, og tað hevur ført við sær, at tað frá byrjan var nógv hjá ráðslimunum at seta seg inn í. Við hollum ráðum og vegleiðing frá starvsfólkunum á Málstovuni fekst greiða skjótt á tí mesta.

Á fyrsta regluliga fundi í Málráðnum, sum var í august, varð starvsnevnd, ið telur 5 limir, vald. Í løgtingslóg um Málráð er ásett, at formaður og næstformaður altíð eru limir í starvsnevndini. Hetta merkir, at 3 limir skuldu veljast millum hinar 9 limirnar. Ein týðandi uppgáva hjá starvsnevndini er at fylgja við og stýra regluliga arbeiðinum á Málstovuni, ið er dagliga avgreiðsla og skrivstova Málráðsins. Starvsnevndin heldur í miðal ein fund um mánaðin, meðan alt Málráðið hevur fund tvær til tríggjar ferð um árið.

Fyrsta hálva árið hjá sitandi Málráði var merkt av málsligum viðgerðum sum liður í arbeiðinum við *Stavsetingarorðabókini.* Harumframt vóru 100.000 kr. í játtanini oyramerktar til teknmál, ið Málráðið eisini varðar av. Nógv orka var løgd í at finna fram til, hvussu tørvurin hjá føroyskum teknmálsbrúkarum og aðalendamálið hjá Málráðnum umskarast. Hóast Málráðið kom fram til eina loysn, fall peningurin tíverri burtur vegna vantandi heimildir. Komandi ár er sama upphædd aftur oyramerkt til teknmál, og sitandi Málráð fer at gera sítt til, at peningurin verður nýttur til at styrkja føroyskt teknmál.

Í fíggjarlógini fyri 2022 er tað gleðiliga hent, at játtanin loyvir, at formaðurin frá 1. januar 2022 fær fasta mánaðarliga samsýning, og at starvsbrotið á Málstovuni fer frá 1,5 til 2,0. Hetta gleðast vit í Málráðnum almikið um, tí arbeiðsbyrða okkara er stór. Áhaldandi talgilding og alheimsgerð hevur ført við sær, at tørvur veruliga er á einum sterkum og virkisfúsum Málráði. Sum Málráð arbeiða vit undir slagorðinum ”Øll eiga málið”. Hetta merkir m.a., at vit arbeiða fyri, at føroyskt skal vera har, ið føroyskir málbrúkarar eru. Hetta er ein stór uppgáva, sum Málráðið ikki lyftir einsamalt. Tó er Málráðið til reiðar at stuðla og stimbra øllum átøkum, sum gagna føroyska málinum.

Tínæst eru vit eisini til reiðar at samstarva við onnur um at bera føroyska málið inn í framtíðina og soleiðis varðveita føroyskt sum samfelagsberandi mál í Føroyum. Ábyrgdin

hvílir á okkum øllum at geva næsta ættarliðinum tann møguleika at leggja heimin undir seg á føroyskum máli. Hetta krevur áræði og nærlagni, men eisini áhaldandi vælvild og játtan frá politiska myndugleikanum.

Vegna Málráðið
*Helena Kannuberg*, formaður

**Limirnir í Málráðnum**



***Helena Kannuberg**, forkvinna*

MA í føroyskum, eftir tilmæli frá Føroyamáli



***Randi Kúrberg***, næstforkvinna

MA í føroyskum, eftir tilmæli frá Námi



***Eyðun á Borg***

Lærari, eftir tilmæli frá landsstýrismanninum



***Meifríð Weihe Hansen***

Heilsurøktari, undirvísir í teknmáli, eftir tilmæli landsstýrismanninum



***Johan Blábjørg***

Fríyrkis teknmálstulkur, undivísir í teknmáli, eftir tilmæli frá Deyvafelagnum/Felagnum HOYR



***Rakul Skaale Andreasen***

MA í føroyskum, eftir tilmæli frá Fróðskaparsetri Føroya



***Theodor E. Olsen***

Teologur, prestur, eftir tilmæli frá Javnstøðunevndini



***Heri J. Joensen***

Teologur, prestur

Eftir tilmæli frá Navnanevndini



***Elin Henriksen***

Lærari, eftir tilmæli frá Móðurmálslærarafelag Føroya



***Bergur Rasmussen***

Lærari, eftir tilmæli frá Rithøvundafelag Føroya



***Lena Reinert***

Vísindaligt hjálparfólk á Føroyamálsdeildini, BA í føroyskum

Eftir tilmæli frá Staðarnavnanevndini

**Starvsnevndin**

Starvsnevndin er mannað við hesum limunum í Málráðnum: Helenu Kannuberg, forkvinnu, Randi Kúrberg, næstforkvinnu, Rakul Skaale Andreasen, Theodor Eli Dam Olsen og Elini Henriksen.

**Starvsfólk**

Málstovan er skrivstovan hjá Málráðnum, og har starvast:



***Kristin Magnussen**, málfrøðingur*

kristin@malrad.fo

312397



***Ragnar Sigrunarson**, málsligur ráðgevi*

ragnar@malrad.fo

312397

**Ráðgeving**

Málstovan veitir stovnum og einstaklingum málsliga leiðbeining. Øll eru vælkomin at skriva til Málstovuna á malrad@malrad.fo ella at ringja á 312397.

143 vórðu svaraðir í 2020, meðan 238 spurningar vórðu svaraðir í 2021. Hetta er ein hækking upp á 66,4%.




Í fjør snúðu 3% av spurningunum seg um stavseting, 9% um mállæru, 5% um málbering, 80% um týðing, og 3% snúðu seg um annað. Hetta merkir, at færri spurningar vóru um stavseting, mállæru og málbering, meðan munandi fleiri vóru um týðing.

**Fundir í Málráðnum**

Í 2021 vóru tríggir fundir í Málráðnum, hin 20. mai, 26. august og 16. desembur.

Fundurin í mai var síðsti málráðsfundur í setuni við Sólvá Jónsdóttur sum forkvinnu. Á fundinum umrøddi Málráðið stavseting av tøkuorðum. Jógvan í Lon Jacobsen, professari í føroyskum og ritstjóri á *Móðurmálsorðabókini*, og Lena Reinert, vísindaligt hjálparfólk á Føroysmálsdeildini, høvdu hvør sítt upplegg um tøkuorð og stavseting.

Uppleggið hjá Jógvani snúði seg í høvuðsheitum um, at føroyska ljóðskipanin ikki rúmar øllum fremmandum ljóðvirðum. Eitt dømi er enska orðið 'crawl' /kɹɔːl/, har ljóðvirðið /ɔː/ ikki rúmast í føroyska stavraðnum, og har fullkomin tillaging hevði kravt eitt víðkað stavrað við t.d. stavinum *å*. Jógvan legði dent á, at í hesum upplegginum var talan um hugleiðingar, har hann vísir á ivamál og møguligar loysnir, sum hann ikki sjálvur hevur tikið endaliga støðu til. Jógvan gjørdi harumframt greitt, at eitt fullfíggjað tekstasavn er avgerandi fyri, at vit fáa eftirfarandi upplýsingar um tídd o.tíl.

Uppleggið hjá Lenu snúði seg um reglufesti og máltøkni við atliti at vanliga málbrúkaranum. Hon vísti á dømi um óregliga stavseting, t.d. *prei* og *bei*, sum eftir ai-regluni áttu at verið stavað ávikavist *prai* og *bai*, av tí at framburðurin í málførum norðanfyri ikki er við /ɔiː/. Lena vísti eisini á, at skal næsta stigið innan máltøkni takast, so má alt, sum vit siga, kunna skrivast. Hetta er serliga umráðandi í sambandi við rættstavarar, talukennarar og sjálvvirknar tekstarar. Í hesum høpi vísti Lena eisini til, at samrøður o.tíl. í sjónvarpinum verður tekstað á ein hátt, har tað, sum verður sagt á leysligum talumáli, verður umskrivað til eitt rættað brigdi av føroyskum, sum ikki umboðar talaða málið í Føroyum.

Fundurin í august var fyrsti fundur hjá núsitandi ráði við Helenu Kannuberg sum forkvinnu. Á fundinum varð starvsnevndin skipað við limunum Helenu Kannuberg, Randi Kúrberg, Elini Henriksen, Rakul Skaal Andreasen og Theodor Eli Dam Olsen.

Á fundinum í desembur varð støðan hjá føroyskum teknmáli tikin til viðgerðar, og Málráðið skifti orð um, hvussu oyramerkta játtanin til menning av teknmálið eigur at verða brúkt.

Í 2021 vóru átta fundir í starvsnevndini, hin 21. januar, 1. mars, 15. apríl, 6. mai, 15. juni, 13. septembur, 16. oktobur og 11. novembur.

**Nýggj orð**

Hesi orðini vórðu løgd aftur at Nýggjorðalistanum í 2021.

| | |
|---|---|
| **djúpfals** *h* | en. *deepfake* |
| **valdstøka** *kv* | da. *voldtægt* (javnsett við *neyðtøka*) |
| **avriksmappa** *kv* | da. *portfolio*, en. *portfolio* |
| **ábærur** *l* | da. *udsat*, en. *exposed* |
| **løgskipa** *s* | da. *regulere*, en. *regulate* |
| **miðlaførleiki** *k* | da. *mediekompetence*, en. *media litaracy* |
| **miðlaførur** *l* | da. *mediekompetent*, en. *media literate* |
| **vitlíki** *h,* **tilgjørt vit** *h* | da. *kunstig intelligens*, en. *artificial intellignece* |
| **endurfeingi** *h* | da. *affald som ressource*, en. *waste as resource* |
| **mólendi** *h* | en. *peatland* |
| **bíðisorg** *kv* | da. *ventesorg*, en. *anticipatory grief* |
| **umhvørvisma** *kv* | en. *environmentalism* |
| **fjølsag** *kv* | en. *multicutter* |
| **óstøðustætt** *kv* | en. *precariat* |
| **umnýta** *s* | en. *repurpose* |
| **frálaging** *kv* | en. *exaptation* |
| **laging** *kv* | en. *aptation* |

Summi av orðunum vóru til frammanundan, t.d. *umhvørvisma*, meðan onnur eru nýyrði frá Málstovuni, t.d. *frálaging*. Uppaftur onnur eru nýyrði, sum spyrjarar sjálvir hava smíðað, t.d. *fjølsag*.

**Stavsetingarorðabókin**

*Stavsetingarorðabókin* er orðabók, sum Málráðið ritstjórnar og gevur út, og sum landsstýrisfólkið í mentamálum løggildar. Hetta merkir, at allir almennir stovnar hava skyldu at fylgja ásetingunum í *Stavsetingarorðabókini*. Umframt stavseting ásetur orðabókin teknseting, bending, kyn og sjálvt stavraðið. *Stavsetingarorðabókin* er grundað á *Føroyska orðabók*, ofta nevnd *Móðurmálsorðabókin*. *Stavsetingarorðabókin* er ætlað at lýsa føroyskt nútíðarmál, og tí verða summi orð í *Móðurmálsorðabókini* sáldað frá, m.a. ávís orð úr kvæðamáli, meðan onnur nýggjari orð, sum ikki eru skrásett í *Móðurmálsorðabókini*, verða løgd aftur at *Stavsetingarorðabókini*. Ein ritstjóri á Málstovuni varðar av orðabókini saman við einum fylgibólki, sum Málráðið setur.

Arbeiðið við *Stavsetingarorðabókini* gongur framá og fer komandi tíðina at snúgva seg um at fáa nýggjari orð og rættingarnar, sum eru gjørdar í fylgibólkinum, førd inn í orðabókina.

**Hendingar í 2021**

Ársins orð varð kosið í beinleiðis útvarpssending í desembur, og tað gjørdist *sammóðir*.

Í sambandi við móðurmálsdagin varð skipað fyri spurnarkapping á appini Kahoot, har fleiri enn 800 fólk tóku lut.

Í 2021 hækkaði játtanin hjá Málráðnum við 100 000 til menning av teknmáli.

**Roknskaparárið 2021**

*Játtan*

| | |
|---|---|
| Játtan | 1.371.000 |

*Útreiðslur*

| | |
|---|---|
| Lønir | 1.205.000 |
| Vørur og tænastur | 33.000 |
| Útbúnaður | 20.000 |
| Innanhýsis millum stovnar | 83.000 |
| Staðarnavnanevndin | 30.000 |
| Til samans | 1.371.000 |